## Semja millum

## Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
## og
## Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2019 til 30. september í 2022.

**Lønarhækkanir**
Tann 1. oktober í 2019 hækka allar mánaðarlønir 2,56%.
Tann 1. januar í 2021 hækka allar mánaðarlønir 2,05%.
Tann 1. oktober í 2021 hækka allar mánaðarlønir 1,25%.

Í § 7, stk. 7 verður síðsta punktum strikað.
Í § 14 verður sett inn nýtt stykki, soljóðandi:
Stk. 3. Umsókn frá starvsfólki, álitisfólki ella nevndarlimi um at sleppa á fakfelagsskeið verður viðgjørd við vælvild.
Í § 20 verða sett inn tvey nýggj stykki, soljóðandi:
Stk. 3. Ferðing í sambandi við tænastuferð verður roknað sum arbeiðstíð, tó hægst 13 tímar um døgnið, uttan so at annað er avtalað millum starvsfólk og arbeiðsgevara.
Stk. 4. Arbeiði á fremmanda tænastustaðnum telur við í arbeiðstíðini eftir vanligum reglum fyri uppgerð av arbeiðstíð.

*Tinganes 27. januar 2021*

**Búskapar- og Løgfrøðingafelagið**

Elisabeth Fransiska Rasmussen
forkvinna

Katrin Thorsvig Hansen, næstformaður

Flóvin Eidesgaard, kassameistari

Bára Akselsdóttir Haraldsen

**Fíggjarmálaráðið**

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

Jan Mortensen
lønarstjóri